UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1-3

logting@logting.fo

Tórshavn, 5. mars 2024
J.nr.: 24/04526

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-094/2023 til Høgna Hoydal, landsstýrismann, frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, um endurgjald fyri mist bit og mist slóttulendi

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Er endurgjaldið fyri mist bit og mist slóttulendi endurskoðað, síðani kunngerðin um umsiting um landsjørð varð sett í gildi í 2007?*
2. *Um endurgjaldið ikki er endurskoðað, er so ætlanin at fáa tað gjørt?*
3. *Um ætlanin er at endurskoða endurgjaldið, nær verður tað so gjørt?*
4. *Metir landsstýrismaðurin, at verandi endurgjald samsvarar við tann kostnað, sum bøndur og onnur, ið varða av haga og jørð, hava í dag?*

Svar:
Prísirnir fyri landsjørð og mist bit eru ikki broyttir, síðani kunngerðin varð sett í gildi í 2007. Fiskimálaráðið viðgjørdi kortini spurningin í 2019 og metti tá, at prísstøðið var nøktandi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er saman við Búnaðarstovuni farið undir at endurskoða kunngerðina. Talan er um rúgvusmikið arbeiðið, sum partvíst er knýtt at komandi landbúnaðarpolitikkinum, og tí ber ikki til at siga nær, at hetta arbeiðið verður liðugt.

Kostnaðurin av jarðarbrúki er, eins og alt annað, dýrkað seinastu tíðina, og tí er ivaleyst ósamsvar millum galdandi reglur um endurgjald og veruliga kostnaðin.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 5. mars 2024

Høgni Hoydal
landsstýrismaður